# Sirri um allan heim

**Sirri er í dag ein fyritøka, ið selur vørur um allan heim. Í fjør keyptu yngri fólk seg inn í fyrtøkuna, sum í dag hevur virki í útlondum og handils- og snigevarahús í Havn, umframt handil í Suðuroynni. Vørurnar fáast eisini í handlum kring landið, og eisini um allan heim**




Í oktober í fjør keyptu Óluva á Lofti og Dávid Nordendal 25% av fyritøkuni Sirri.

Árni og Karin Brattaberg stovnaðu fyritøkuna.

Nýggju parteigararnir leggja alstóran dent á, at talan er um náttúrliga vøru, og eisini hevur tað vistfrøðiliga týdning.

- Ullin verður bert vaska, annað verður ikki tilsett, ella tikið úr, sigur Óluva á Lofti.

## Handil og sniðgevar

Handilin, har tey halda til í Dr. Jacobsensgøtu, eiga Óluva og Dávid sjálvi.

- Handilin er ikki bara handil, tí afturat mær havi eg 3 sniðgevar; Johonnu av Steinum, Malan av Lofti og Barbaru í Gongini, greiðir Óluva á Lofti frá.

Og um hetta at hava alt undir somu lon sigur hon, at við hesum er líka so nógv talan um eitt sniðgevarahús, sum handil.

## Úti í heimi

Sirri byrjaði í Suðuroynni, og virkið er har enn, um tað stendur á at framleiða, men annars hevur Sirri flutt framleiðsluna og verður nú framleitt á virki í Litava.

- Framleiðsluvirkið í Føroyum gjørdist ov lítið, sigur Óluva á Lofti.

Á virkinum í Litava arbeiða 40 fólk.

- Sirri er í dag kring allan heim, sigur Óluva á Lofti, og sum dømi nevnir hon, at vørur verða seldar í Kina, Amerika, Russlandi og Týsklandi.

Sirrivørur eru snøgt at fáa kring allan heim.

- Vit hava nú eina ætlan um at gera kollektiónir, eina til veturin og eina til summarið, sigur Óluva á Lofti.

Umframt handilin í Havn, er Handil eisini í Suðuroynni, og vørurnar fáast eisini í øðrum handlum kring landið.

*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*











